## Rík skulu rinda heimahjálp

Radikali flokkurin í Danmark er komin á pallin við einum uppskoti, sum uttan iva kann elva til eitt lívligt orðaskifti. Flokkurin sigur, at stakir fólkapensjonistar, sum hava eina inntøku oman fyri 281.000 krónur um árið, skulu rinda fyri at fáa heimahjálp. Fyri hjún ella sambúgvandi fólkapensjonistar skal markið vera 328.000 krónur. Ein meiningakanning hjá Megafon vísir, at 58 prosent av danska fólkinum taka undir við, at fólkapensjonistar, sum hava ráð til tess, rinda fyri heimahjálpina. 36 prosent eru ímóti.



## Kanna fólkadráp

Donsku myndugleikarnir kanna nú, um nakar av teimum, sum vóru uppi í fólkamorðinum í Rwanda í 1994, fjalir seg í Danmark. Danska ákæruvaldið hevur havt fólk í Rwanda, har tey hava leitað eftir upplýsingum um fólk úr Rwanda, sum búgva í Danmark. Nógv fólk hava verið undir illgruna, men Lars Plum, vararíkisadvokatur, sigur við DR, at tey flestu eru ikki undir illgruna longur. Meiri vil hann ikki siga. Meiri enn 800.000 fólk doyðu í fólkamorðinum í Rwanda í 1994, og fleiri av drápsmonnunum fjala seg enn.

# Norðoyatunnilin steingjast fleiri tímar um samdøgurið

**Eftir páskir verður fundur ímillum landsstýrið og býráðið í Eysturkommunu um vegin í sambandi við Norðoyatunnilin. Spyrst onki burtur úr, eru vit til reiðar at gera álvara av ætlanini um at stongja vegin, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*

– Finna vit ikki eina nøktandi semju eru vit til reiðar at ganga plankan út.

Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu, sigur, at teir næstu dagarnir verða avgerðandi fyri um býráðið fer at krevja, at vegurin í samandi við Norðoyatunnilin verður stongdur ella ikki.

Eftir páskir skal fundur verða ímillum Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, og býráðið í Eysturkommunu um vegin í sambandi við Norðoyatunnilin.

Fundurin er komin í lag eftir at býráðið herfyri einmælt noktaði at longja loyvið at knýta tunnilsvegin í tann kommunala vegin.

Samstundis hevur býráðið kravt, at er tað so, at vegurin, sum nú er til tunnilin ikki er ein partur av ætlaða framtíðarvegnum, men kemur at liggja sum ein blindtarmur, skal hann beinanvegin gravast upp, sáast við grasi, so at lendið kann handast aftur í sama standi, sum tað á sinni varð latið til vegin.

Orsøkin til at býráðið hevur tikið so ógvuslig stig, er, at tey nú hava mist tolið, eftir at ongin loysn framvegis er í eygsjón á vegnum ígjøgnum Leirvík í sambandi við tunnilin, hóast málið er fleiri ára gamalt.

### Ganga plankan út

Síðani er fundur avtalaður við landsstýriskvinnuna og hann verður eftir páskir.

– Úrslitið av tí fundinum verður avgerandi fyri, hvat vit gera, sigur borgarstjórin.

Hann leggur dent á, at spyrst ikki eitt nøktandi úrslit burtur úr, eru tey til reiðar at ganga plankan út, sum hann málber seg.

Tað merkir, at býráðið fer at taka stig, sum bera í sær, at tunnilsvegurin verður stongdur ein stóran part av sólarringinum.

– Og tað verður rættiliga skjótt eftir fundin, at tey tiltøkini verða sett í verk.

– Vit hava eina einmælta býráðssamtykt at halda okkum til og hana mugu vit virða, leggur hann afturat.

– Tað er kommunan, sum skal geva loyvi til at binda í kommunalan veg, men tað loyvið hava vit givið undir skeivum fortreytum, tí onki er hent og sostatt er tað nú tikið aftur.

Annars leggur hann afturat, at tað er semja um, hvussu vegurin skal leggjast. Men Løgtingið til ikki játta neyðugu upphæddini, so at arbeiðið kann gerast og tað er har hundurin er grivin.

### Avmarkaður stongsil

Hann sigur, at Býráðið hevur fingið tvey løgfrøðilig upprit um málið og eftir teimum er tað greitt, at tað er kommununan, sum hevur valdið á tí kommunala vegnum.

Hinvegin ber ikki til at stongja tunnilsvegin heilt.

– Men býráðið hevur fulla heimild at seta ein avmarkaðan stongsul í verk.

Tað merkir at vegurin skal stongjast, so at ferðslan bara verður leidd ígjøgnum ávísar tíðir eftir leiðbeining frá kommununi.

*Merkir tað so, at vegurin verður stongdur ávísar partar av døgninum?*

– Eg vil heldur siga, at tað merkir, at hann bara verður opin ávísar partar av døgninum, sigur Jóhan Christiansen.

Hvussu nógvar tímar, vegurin verður opin, dugir hann ikki at siga.

Men hann sigur, at helst verður tað gjørt soleiðis, at krav verður sent Norðoyatunlinum um at seta bumm fyri vegin, sum bara skal vera opin ávísar klokkutíðir, sum kommunan ásetir.



*Nú skal tað vera egg ella ungi og eftir páskir fáa vit at vita um býráðið í Eysturkommunu fer krevja, at bummur verður settur fyri vegin í sambandi við Norðoyatunnilin, so at hann verður stongdur ein stóran part av samdøgurinum*

## Ramasti álvari

– Hetta er ramasta alvor.

Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu kennir onki til tað, sum Annika Olsen førir fram í hinari greinini um, at samtyktin um at stongja vegin í Sambandi við Norðoyatunnilin er tikin aftur.

– Samtyktin stendur við, men tað er rætt, at vit hava parkerað hana til fundurin við Anniku Olsen hevur verið.

Úrslitið av fundinum verður avgerandi fyri, hvat víðari hendir, tí finna vit ikki eina semju, vit í býráðnum eru nøgd við, eru vit til reiðar at seta samtyktina í verk, sum í veruleikanum førir við sær, at ferðalan ígjøgnum Norðoyatunnilin verður stongd ein stóran part av sólarringinum.

Talan verður ikki um at stongja vegin heilt, tí so er mest sannlíkt, at krav verður sett fram um, at hann skal latast upp aftur út frá einum samfelagsligum neyðrættarligum sjónarmiði.

Men kommunan hevur myndugleika á kommunalum vegi og ongin kann forða okkum í at seta avmarkaðan stongsul í verk, sigur borgarstjórin.

# Vil ikki samráðast undir trýsti

**Annika Olsen fer nú á fund við Leirvíkingar um tiltikna vegin til Norðoyartunnilin, men hon tekur tað rættiliga alvorligt, at býráðið hóttir við at seta tiltøk í verk, sum bera í sær, at vegurin verður kappaður av**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Beint eftir páskir fer Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, á fund við býráðið í Eysturkommunu fyri at vita um tað ber til at finna eina loysn á føroya mest umstrídda vegastrekki, sum er vegurin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

Fundurin er komin í lag eftir at býráðið í eysturkommunu gjørdu bart herfyri og kravdi, at vegurin, sum er bundin í kommunuvegin verður grivin upp beinanvegin, sáddur við grasi og handaður kommununi aftur í sama standi, hann á sinni varð latin til vegin til Norðoyatunnilin.

Hetta merkir í veruleikanum, at vegurin til Norðoyatunnilin verður grivin av so at øll ferðsla ígjøgnum tunnilin má halda uppat.

Orsøkin til, at býráðið fer so harðliga til verka, er sjálvandi, at tað hevur drigið so leingi út at gera vegin og at heldur onki røkist fyri, at nakað hendir við tað fyrsta.

Men tað er rættiliga fallið landsstýriskvinnuni fyri bróstið, at býráðið hevur hótt við tiltøkum, sum í veruleikanum føra við sær, at tunnilin verður stongdur fyri ferðslu.

– Eg havi skrivað býráðnum í Eysturkommunu skriv, har eg havi boðað frá, at tað ber ikki til at samráðast við eini slíkari hóttan hangandi yvir høvdinum.

Hon skilir, at býráðið fatar álvaran í málinum og at hóttanin tískil er tikin aftur.

– Hóast eg skilji væl, at tolið er uppi, kann eg ikki samráðast við einum revolvara fyri pannuni, sigur hon.

### Royna at finna semju

Sostatt hevur Annika Olsen avtalað at hitta býráðið á fundi.

– Á fundinum fari eg at royna at fáa greiði á, akkurát, hvussu málið liggur og endamálið er so sjálvandi eisini at fáa at vita, hvat vit kunnu semjast um á økinum.

Sostatt vónar hon at finna eina skilagóða loysn, sum báðir partar kunnu vera nøgdir við.

Hartil kemur so eisini, at enn er ógreitt, hvat verkætlanin kostar. Settar eru 40 milliónir av til endamálið, men metingarnar vísa, at tað kostar 50. Seinastu tíðina hava tey tískil roynt at samráðast seg fram til ein lægri prís.

Tá ið tað er greitt, hvat semja fæst um og, hvat tað kostar, fer Annika Olsen at royna at fáa undirtøku í samgonguni fyri at seta tað í verk.